Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

**Dagfesting:** 29.02.2024 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Per Martin Gregersen
Katrin Kjartansdóttir
Magnus Skoralíð
Marjun Andreasardóttir
Rúni Justinussen
Marita Klein Joensen
Petur Súni Jacobsen
Hjalti Dalheim
Hanna Jensen

Varalimir:

Ikki møtt: Marjun Andreasardóttir

Nevndarskrivari: Erik Lervig

| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar:** | | | |
| 7/24 | 24/00179-3 | Víðkan av Ídnaðarøki C - Úti á Vík í Leirvík | 2 |
| 8/24 | 24/00142-2 | Umsókn um byggiloyvi til størri hjall á matr. nr. 86av | 3 |
| 9/24 | 24/00170-2 | Samanlegging av matrikul nr. 422a og ah í Leirvík | 5 |
| 10/24 | 24/00046-6 | Hitapottar í Leirvíkar skúla matr. nr. 422a i Leirvík | 6 |
| 11/24 | 24/00190-3 | Ljós í Sarpugerði | 7 |
| 12/24 | 24/00009-3 | 24/000009 - Frágreiðing og tilmæli | 8 |
| 13/24 | 24/00020-6 | 24/00020 - Útbygging av læknamiðstøðin í Gøtudali | 9 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | |

**Til viðgerðar:**

## 7/24 Víðkan av Ídnaðarøki C - Úti á Vík í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.02.2024 | 10/24 | 24/00179-3 |
| 2 Vinnunevndin | 21.02.2024 | 3/24 | 24/00179-3 |
| 3 Býráðið | 29.02.2024 | 7/24 | 24/00179-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um møguliga at gera eina atløgubryggju úti á Vík í Leirvík.<br><br>Í samband við hetta er neyðugt at broyta býarplanin úti á Vík í Leirvík. Økið skal broytast frá Landbúnðarøki J til Ídnaðarøki C. Sí skjal í málinum.<br><br>Mælt verður til at broyta omanfyri nevnda býarplan frá Landbúnaðarøki J til Ídnaðarøki C, sum víst á tekning. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til, at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. februar 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Vinnunevndin 21. februar 2024**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 29. februar 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og vinnunevndini.

## 8/24 Umsókn um byggiloyvi til størri hjall á matr. nr. 86av

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.02.2024 | 7/24 | 24/00142-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | | | 24/00142-2 |
| 3 Býráðið | 29.02.2024 | 8/24 | 24/00142-2 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um 2 frávik í samband við bygging á matr. nr. 86av í Norðragøtu, verandi bygging er steðga tí arbeiðstakarin er farin á húsagang.

Byggingin hevur ikki verið framd sambart verandi tekningum, so sum hall á tekju og hava tí ánarinir sent umsókn um frávik til hæddir og frávik til mark. Aftrat hesum er umsókn um byggiloyvi til hjall.

Verandi kota á hægsta punkti skuldi verða 38.27 sambart byggiloyvinum.

**Frávik 1.**
Søkt verður um, at fáa loyvi at byggja/hækka takkrúnu við 41,4 cm og gera kílabjálving, tá verandi tekja er gjørt vatnrætt.

Byggingin, ið er framd higartil hevur ikki hildið seg til givna byggiloyvi viðv. hæddum, hæddin á lidnum útveggi átti at verið á kota 38.27, men er í staðin enda á kota 38.921.

Um byggingin hækkar við 41,4 cm endar bygningurin á kotu 39.335, altso 1,065 m hægri enn ætlað.

Mælt verður til, at gera tekjuna sum einvegis hall uttan krúnu, tá endar hægsta punkt á kotu 39.121.

Samlaða hæddin á bygninginum verður nú 8,101 m og í serstøku byggisamtyktini er mest loyvda hæddin 8,0 m við einvegis halli, tvs. bygningur verður 10 cm hægri.

4.3. Mest loyvdu hæddir

Omanfyri vegin:

- Hús við vanligari mønureising mugu ikki vera hægri enn 6,5 m til hægsta punkt við útvegg og 9,0 m til mønuna, mált frá planeringshædd. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
- Hús við sløttum taki mugu ikki vera hægri enn 6,5 m til hægsta punkt við útvegg, mált frá planeringshædd.
- Verða hús bygt við einvegis takhalli, kann tann lægra síðan í mesta lagi vera 6,5 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi vera 8,0 m, mált frá planeringshædd.
- Í sonuni kann bert byggjast upp til +3,5 m frá planeringskotu -0,5 m, sí tekning (kortskjal 1). Um svali verður gjørdur í sonuni omanfyri ásettu hæddina skal girðingin vera gjøgnumskygd.
- Planeringskotan verður staðsett útfrá hæddarkotu úti við vegin og kann síggjast á kortskjali 1.

Niðanfyri vegin:

- Hús við vanligari mønureising mugu ikki vera hægri enn 6,5 m til hægsta punkt við útvegg og 9,0 m til mønuna, mált frá planeringshædd. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
- Hús við sløttum taki mugu ikki vera hægri enn 6,5 m til hægsta punkt við útvegg, mált frá planeringshædd.
- Verða hús bygd við einvegis takhalli, kann tann lægra síðan í mesta lagi vera 6,5 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi vera 8,0 m, mált frá planeringshædd.
- Í sonuni kann bert byggjast upp til +3,5 m frá planeringskotu -0,5 m, sí

**Frávik 2.**
Umframt verður søkt um, at klæða bygningin við timburklæðing. Frástøðan millum mark og verandi bygningur er 2,5 m sum er minsti avstandur frá mark. Tá bygningurin er klæddur er frástøðan 2,404 m til markið móti norður og suðursíðuni.

Mælt verður til, at geva frávik til hetta við tí treyt, at klæðingin verður gjørd sambart tekning nr. 5.01, dagfest 08.12.2023.

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
| --- |
| Ongar |

| **Tilmæli** |
| --- |
| Mælt verður til, at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. februar 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 29. februar 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 9/24 Samanlegging av matrikul nr. 422a og ah í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.02.2024 | 8/24 | 24/00170-2 |
| 2 Býráðið | 29.02.2024 | 9/24 | 24/00170-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna ynskir, at at leggja skúlaøkini matr. 422a og ah í Leirvík saman til ein matrikul.<br><br>Hetta er neyðugt, fyri at møguligt skal verða at fremja nýggju skúlabyggingina í Leirvík. Sí skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at taka undir við samanleggingini av matriklinum. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. februar 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 29. februar 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 10/24 Hitapottar í Leirvíkar skúla matr. nr. 422a i Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 20.02.2024 | 3/24 | 24/00046-6 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.02.2024 | 6/24 | 24/00046-6 |
| 3 Fíggjarnevnd | 26.02.2024 | 3/24 | 24/00046-6 |
| 4 Býráðið | 29.02.2024 | 10/24 | 24/00046-6 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur ætlanir um at gera eitt vælveru øki uttanfyri svimjihøllini í Leirvík.<br><br>Ætlanin er, at gera eitt úti øki uttanfyri svimjihøllina har tað verða hitapottar, kaldur pottur og møguliga ein sauna.<br><br>Umsitingin gjørdi eina kostnaðarmeting av verkætlanini í 2023 sum var áljóðandi 2.884.687,50 kr. við teimum hitapottum, einum kaldum potti, einari sauna við tilhoyrandi teknikki og lendisarbeiði. Sí mál 23/00236.<br><br>Verkætlanin var tá fyri býráði, at mælt var til at taka seta pening av til hesa verkætlan í 2024, 3 mió. eru síðan avsettar til hetta.<br><br>Ætlanin er, at seta gongd á hesa verkætlan og at bjóða arbeið út.<br><br>Mælt verður gera útbjóðingartilfar, bjóða arbeiði út og gera sáttmála. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 3.000.000,- kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. |

### Mentanarnevndin 20. februar 2024

Mentanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum. Nevndin leggur afturat, at garderoba/knagar/hill verður ein partur av útiøkinum.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. februar 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.

**Fíggjarnevnd 26. februar 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at tka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 29. februar 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

## 11/24 Ljós í Sarpugerði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 20.02.2024 | 5/24 | 24/00190-3 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.02.2024 | 11/24 | 24/00190-3 |
| 3 Fíggjarnevnd | 26.02.2024 | 5/24 | 24/00190-3 |
| 4 Býráðið | 29.02.2024 | 11/24 | 24/00190-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur biða um tvey tilboð uppá nýggja ljós í Sarpugerði i Norðragøtu, hetta er fyri at betra um ljósviðurskiftini kring vøllin i Sarpugerði.<br><br>Uttanhýsis ráðgeving kannar tilboðini og hvørji ljós hóska seg best, tilmæli kemur í komandi viku. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 20. februar 2024**

Nevndin er kunnað og bíðar eftir tilmæli frá ráðgevara.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. februar 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.

**Fíggjarnevnd 26. februar 2024**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**Býráðið 29. februar 2024**
Málið tikið av skrá.

## 12/24 24/000009 - Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 20.02.2024 | 2/24 | 24/00009-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 26.02.2024 | 6/24 | 24/00009-3 |
| 3 Býráðið | 29.02.2024 | 12/24 | 24/00009-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Arbeitt verður við at gera økið um bønhústoftina í Leirvík eitt atraktivt øki, har ferðafólk og bygdafólk kunnu vitja og síggja hetta fornfrøðiliga eindømi. Sum nú er liggur lendið órøkt. Illa frágingnar veltir eru í lendinum, ið er bæði vátt og ónosligt, og tað er ikki eins lætt at síggja toftina sum tað hevur verið.<br><br>Uppskotið er at gera ein gøtu, ið gongur runt um bønhústoftina soleiðis, at tað er lætt at síggja, hvar ein kann ganga, at gingið verður uttan at dálka seg ov nógv og at tað er møguligt at fáa gott yvirblikk yvir toftina, tí hæddarmunurin í lendinum ger, at toftina sæst betur frá gøtuni enn frá vegnum sum nú er. Gøtan verður av sama slagi eins og t.d. tær, ið eru á Toftanesi.<br><br>Trý ymiskt gøtuuppskot eru. AJ hevur verið í samband við Tjóðsavnið, ið er mest áhugað í teirri gøtu, ið hevur skap sum ein hestaskógvur. Bæði Tjóðsavn og bóndi mugu tó vátta gøtuna, áðrenn hon kann setast í verk. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Aðrar gøtur í kommununi hava kostað áleið 3.000 kr/meturin. = 360.000 kr. Peningur er ikki settur av til hetta og tí má ein evt. eykajáttan gerast. |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 20. februar 2024**
Mentanarnevndin mælir til at taka undir við antin uppskotið 2 ella 3. Gjarna gøtan, ið er formað sum ein hestaskógvar við einum «view-point» uppi í lendinum.

**Fíggjarnevnd 26. februar 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentananevndini, og at peningurin verður tikin av játtanini til konto 6.11.32.510 (Fríðkan av kommununi/sniðgøtir)

**Býráðið 29. februar 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini, og at peningurin verður tikin av konto 6.11.32.510 (Fríðkan)

## 13/24 24/00020 - Útbygging av læknamiðstøðin í Gøtudali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 29.02.2024 | 13/24 | 24/00020-6 |

| Málslýsing: |
|---|
| Víst verður til fyriiliggjandi tekningar frá Teknistovuni í Gøtu og tilboð frá Articon dagfest 27/2-24.<br><br>Á heysti í fjør boðaði Heilsutrygd frá at ein lækni er settur afturat til viðtaluna í Gøtu. Núverandi hølir eru ikki nóg stór at hýsa fleiri læknum og tískil er neyðugt at víðka um viðtaluna.<br><br>Teknistovan í Gøtu hevur tekna og gjørt uppskot til útbygging. Eftirfylgjandi bað umsitingin um tilboð frá Articon uppá arbeiðið. Síðani hava fundnir verið millum kommununa og Articon, og hevur Articon í hesum sambandi víst á onkrar broytingar sum teir meta kunnu gerast fyri at kostnaðurin niður. Semja er um at gera hesar broytingar og hevur Articon lati kommununi tilboð uppá arbeiðið.<br><br>Væntandi verður útbyggingin liðug um árskifti 2024/2025. |

| Fíggjarligar avleiðingar: |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2024 eru 5,6 mió. avsettar til arbeiðið. Samlaði kostnaðurin verður nakað hægri, og tí verður neyðugt við eykajáttan seinni í ár. Ella peningurin verður avsettur á fíggjarætlanini fyri 2025. |

| Tilmæli |
|---|
| Umsitingin mælir til at taka av fyriliggjandi tilboðið frá Articon. |

**Býráðið 29. februar 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

fundurin lokin kl. 19.00

Per Martin Gregersen

Katrin Kjartansdóttir

Magnus Skoralíð

Marjun Andreasardóttir

Rúni Justinussen

Marita Klein Joensen

Petur Súni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Hanna Jensen